50 STARVSMANNAFELAGIÐ

## Móttøka

*Almenn móttøka verður í hølum felagsins mikudagin 23. februar 2011 kl. 15-18*

*Øll eru hjartaliga vælkomin á gátt at heilsa felagnum á stóra degnum.*

**Starvsmannafelagið**
J. H. Schrötersgøta 9

# Frá S & K felagnum

Aðalfundur felagsins verður í húsinum hjá S & K felagnum, Traðarvegur 20, Tórshavn,

leygardagin 19. februar 2011 kl. 19.00

**Dagsskrá sambart lógum felagsins:**

1. Frásøgn formansins frá farna árið
2. Roknskapur til góðkenningar
3. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum. (2 nevndarlimir standa fyri valið og 3 stillað upp)
4. Val av formanni (ikki í 2011)
5. Innkomin uppskot
6. Ymiskt

**Nevndin í S & K felagnum**

S&K

# KOYRIKORT

TEORISKEIÐ - ENDURTØKA - TAXA - R.F.SKEIÐ



Sosialurin 341800

## NÝTT TEORISKEIÐ

byrjar mánadagin 21. februar kl 16.00,
á Niðaravegi 11 í Søldarfirði.
Ring og melda til hjá Andreu Isaksen á tlf 211687
ella hjá Karl Rasmussen á tlf 212048.

**ANDREA ISAKSEN**
TEL. 211687

---

## HAVNARUMSJÓNARFÓLK

**Tórshavnar havn søkir eftir havnarumsjónarfólki at byrja 1. juni 2011.**

Arbeiðið er skipað í skiftandi vaktum. Av tí at arbeiðsplássið er lítið, kann roknast við ymiskum uppgávum.

Tú skalt, á jøvnum føti við hini havnaumsjónarfólkini, kunna veita loðstænastu.

Tú hevur ein kundavinarligan framburð, og kann arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Roknað verður við, at tú hevur útbúgving sum skipsførarari, og at tú dugir væl at orða teg í skrift og talu á føroyskum og enskum, umframt hegni og hug til teldu.

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**UMSÓKN**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Tórshavnar havn, Postboks 103, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 23. mars 2011.

**MEIRA FÆST AT VITA**
um starvið við at venda sær til Jónsvein Lamhauge, havnarmeistara, telefon 311762.

## SJÚKRARØKTARFRØÐINGAR

**Søkt verður eftir tveimum sjúkrarøktarfrøðingum til Tjarnargarð at byrja sum skjótast.**

Arbeiðstíð: 0,6 sum er avloysarastarv fyri barnsburðarfarloyvi árið út fyribils og 0,7 sum er fast starv. Fyri bæði størvini er talan um skiftandi vaktir.

Á Tjarnargarði eru 34 røktarheimspláss og 15 dagstovnapláss fyri fyri heimabúgvandi fólk, sum eru minnisveik.

**VIT VÆNTA AT TÚ**
- hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- hevur áhuga og/ella royndir á eldraøkinum
- hevur góð samstarvsevni
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkunum
- er nýhugsandi og hevur hug og áræði at skipa fyri dagliga virkseminum hjá búfólkunum
- kann vegleiða lesandi og næmingar, sum koma í starvspraktikk

**VIT KUNNU BJÓÐA**
- eitt áhugavert og positivt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna umsorgan og røkt

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála hjá FFS.

**UMSÓKN**
Saman við viðmælum, avrit av møguligum prógvum og upplýsing um royndir, skal vera hjá Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 7. mars 2011 kl. 12.

**MEIRA FÆST AT VITA**
Við at venda sær til Hensiu Einarsson, leiðara, telefon 302075 / 214075, ella á teldupost: hensia@torshavn.fo.

## PEDAGOGUR

**Tórshavnar kommuna søkir vegna Býlingshúsið undir Fjalli eftir einum pedagogi til barnagarðsstovu við 3-4 ára gomlum børnum, at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1.apríl 2011 ella eftir nærri avtalu.**

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**UMSÓKN**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjalsgøta 25, 100 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 4. mars 2011.

**MEIRA FÆST AT VITA**
um starvið við at venda sær til Ingigerð Holm, stovnsleiðara, tlf. 302230 / 228525 ella Birnu Mikkelsen, varaleiðara, telefon 250806.

---

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER HØVUÐSSTAÐARKOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava ein nútímans leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA